## Frægasta veðrið er um heystið

- Veðrið her skiftur við árstíðunum. Kaldast er um veturin, tá liggur hitin millum 5 og 15 hitastig. Tað ljóðar ikki so kalt, men her í Hong Kong verða húsini bjálvað so væl, og tí kann tad kennast kalt og váttligt. Í mars byrjar tað at blíva heitari, og í juni byrjar regntíðin. Juli, august og seátember eru teir heitastu og mánaðirnar, og tá kunnu eisini tyfonir herja. Besta tíðin í Hong Kong er um heystið, tí tá er tað meira heitt og turt, greiðir Anna Sofía Larsson frá.



# ið í fjareystri





*Anna Sofía Larsson hevur ferðast nógv, meðan hon hevur búð í Hong Kong. Her eru hon og maður hennara stødd í base camp á Mount Everest. Fjallatindurin á heimsins størsta fjalli sæst í baksýninum*

Fjøllini her eru eisini øðrvísi enn tey føroysku.

Her vaksa nógv trø, og tú kanst síggja nógv spennandi djór – til dømis slangur, falkar, stórar eiturkoppar og apur.

**Er tað nakað, sum tær ikki dámar við Hong Kong?**

Tað mær dámar minst við Hong Kong er luftin og luftvætan. Her er luftin ikki so rein sum heima í Føroyum, og meginpartin av árinum er luftavætan høg.

**Hvussu er mentanin í Hong Kong?**

Tann kinesiska mentanin líkist ikki okkara føroysku. Her eru bæði familjusambond og høgtíðir øðrvísi. Heima í Føroyum búgva vanliga eitt ella tvey ættarlið í einum húsarhaldi. Her í Hong Kong kunnu trý ættarlið búgva saman. Her finst eitt ordatak sum sigur, at "vesturlendingar arbeiða fyri at liva, meðan kinesarir liva fyri at arbeiða". Tey arbeiða langar dagar og hava lítla frítíð. Ein vanlig arbeiðsvika er 6 dagar, og tey fáa 12 dagar feriu um árið, tá tað kinesiska nýggjárið er. Her fáa fólk heldur ikki pensión, tá ið tey gerast gomul. Tá ið foreldrini ikki orka at arbeiða longur, eru tað børnini, sum hava ábyrgdina av at forsyrgja teimum.

Heima í Føroyum dáma tey eldru væl at ganga á bingo ella samlast fyri at spæla kort ella okkurt annað. Fert tú tíðliga upp um morgunin her, sært tú fleiristaðni eldri fólk gera tai chi. Tai chi er eitt slag av kampsporti, har ein rørir seg spakuliga og ger mjúkar rørslur. Eitt annað væl dámt frítíðarítriv er at spæla mahjong, sum er eitt borðspæl. Shopping er eisini ein stórur partur av mentanini. Handlarnir her hava aðrar upplatingartíðir enn heima. Her bæði lata teir upp og aftur seint. Her finnast eisini nógvir marknaðir við øllum møguligum spennandi tingum, og ein má heldur ikki gloyma at prutta um prísin.

Størsta trúgvin í Hong Kong er buddisma og taoisma. Her halda tey eisini aðrar høgtíðir enn heima. Heima eru størstu høgtíðirnar jól og páskir. Her hava tey tað kinesiska nýggjárið og ching ming.

Kinesiska nýggjárið verður hildið saman við familju. Alt verður vaskað og ruddað, og rokningar goldnar, so at alt er reint og skuldarfrítt, tá ið tað nýggja árið kemur. Heimini verða pyntað við reyðum lampum og reyðum skiltum sum ynskja góðum andum vælkomnum. Fólk samlast heima hjá hvørjum øðrum, eta og hugna sær saman. Børnini fáa smáar reyðar brævbjálvar við pengum í - kallað lai see. Henda høgtíðin varðar í umleið fýra dagar.

Á Ching Ming vitja kinesarnir gravarnar hjá sínum deyðu og rudda tær. Heima keypa vit eina blómu at seta á gravarnar. Her í Hong Kong seta fólk mat og vín á gravirnar, og roykilsi og pappírpeningur verða offrað. Henda høgtíðin varðar tríggjar ella fýra dagar.

Eitt, sum kann samanberast við føroysku mentanina, er kappróðrarstevna. Her hava tey eina stevnu, sum eitur "dragon boat festival". Bátarnir hava skap og eru málaðir sum drekar. Tað kunnu vera yvir 20 fólk í hvørjum báti. Stevnan verður hildin í nakrar dagar, og róð verður ymsastaðni í Hong Kong.

**Hvussu er maturin?**

Hong Kong hevur ein internationalan køk. Her finst alt frá Beijing-dunnu til danskt livurpostei. Tann køkurin, mær dámar best, er sezchuan, sum er sterkur kinesiskur matur.

Men tann maturin, sum er mest kendur í Hong Kong, er dim sum. Tað er kjøt, sjómatur og grønmeti, sum verður malið, fylt í smáar deiggjposar og síðan dampa.

Hesir smáu rættir, kallaðir dumplings, verða síðan borðreiddir í smáum bambus-kurvum og koyrdir runt á vogni millum borðini. Har kunnu fólk so velja hvørja kurv, tey vilja hava. Dim sum merkir eisini at drekka te. Heima í Føroyum plaga vit at hava drekkamunn saman við vinfólki heima hjá okkum sjálvum. Her møtast fólk ístaðin á eini dim sum matstovu og hugna sær vid te og ymiskum smárættum.

**Hevur tú ætlanir at flyta heim til Føroya aftur?**

Nei, maður mín er svii, so eftir Hong Kong gongur leiðin móti Svøríki.

**Hvat saknar tú mest við Føroyum?**

Tað, sum eg sakni mest heima, er familjan, hundin hjá mær og ta reinu, góðu luftina.